


*Samlaði útflutningur Føroya var 180 milj. krónur minni ár 2002 enn í ár 2001.*

# Vit selja næstan bara fisk

**Av føroyska útflutninginum ár 2002 uppá tilsamans 4,1 miljardir krónur, telir útflutningurin av fiski heili 99,6%. Einstøku fiska-vørurnar, sum geva mest í kassan, er feskt og fryst toskaflak**

ÚTFLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*

Í mong, mong ár hevur verið sagt, at føroyingar liva av fiski - og næstan bara av fiski.

Hyggja vit at útflutninginum seinasta ár, er hetta framvegis í ár 2002 so rætt, sum tað er sagt.

At kalla allur útflutningur Føroya er fiskur - ella heili 99,6%!

Hetta vísa almennu hagtølini hjá Hagstovu Føroya.

Hagtølini vísa samstundis, at útflutningurin av øðrum vørum hevur ongantíð verið so lítil seinastu 15 árini sum í ár 2002.

### Skip og aðrar vørur

Tann parturin av útflutninginum, sum ikki er fiskur, er "skip" og "aðrar vørur", men útflutningurin av skipum og vørum hevur ongantíð verið so lítil síðan 1988.

Í Vinnuhúsinum, sum hevur hugt at útflutningshagtølunum, siga tey, at "aðrar vørur", eru eitt nú skinn, fiskireiðskapur og annað. Hesar høvdu eitt útflutningsvirði uppá 12,4 milj. krónur, sum svarar til 0,3% av samlaða útflutninginum.

- Hetta er eitt ógvuliga lágt tal sum vísir, hvussu einstáttað vinnumynstrið í veruleikanum er, sigur Vinnuhúsið.

Í ár 2002 var útflutningsvirðið av skipum 4,7 milj. krónur, sum svarar til 0,12% av útflutninginum.

- Men av tí, at hetta sum oftast eru gomul skip, sum verða seld úr flotanum, verður talið vanliga ikki tikið við, tá ið metast skal um útflutning av føroyskari framleiðslu, veit Vinnuhúsið at siga.

### Feskt og fryst toskaflak

Størsti høvðusbólkurin í útflutninginum er feskt og fryst toskaflak, sum stendur fyri 1.148 mij. krónum ella 28%. Síðan kemur ísaður og frystur (heilur) fiskur við 922 milj. krónum ella 22%. Laksur og síl standa fyri 18% og saltfiskur fyri 16% av útflutningsvirðinum. Rækjur og skeljar, sum onkuntíð hava verið heilt uppi á 20% av útflutninginum, eru nú heilt niðri á 6%.

Samlaði útflutningurin úr Føroyum ár 2002 hevði eitt virði uppá 4,1 miljard krónur. Tað er ein lækking uppá 180 milj. krónur ella 4,2% í mun til ár 2001.

# Ísland góðtekur at fiskiskip flagga við tveimum fløggum

**Tað var ein tepur meiriluti í íslendska altinginum, sum samtykti nýggju og umstríddu lógina um, at íslendsk fiskiskip skulu kunna "bareboat-skrásetast", sum tað verður rópt**

ÍSLAND
*Vilmund Jacobsen*

Samtyktin í altinginum merkir, at íslendsk fiskiskip nú kunnu fiska á fjarskotnum leiðum undir fremmandum flaggi, hóast skipini eru skrásett í Íslandi.

Íslendska reiðarafelagið, LÍÚ, sum umboðar íslendsku skipini, hevur leingi roynt at fáa myndugleikarnar at samtykkja eina tílíka lóg, sum ger tað møguligt hjá íslendskum skipum at sigla undir tveimum fløggum samstundis.

Reiðararnir halda, at hetta gevur íslendskari fiskivinnu møguleikar at tjena pening á fjarskotnum leiðum.

Herfyri samtykti so altingið hesa umstríddu lóg við teprum meiriluta; 22 atkvøddu fyri og 18 ímóti.

### "Piratlógin"

Fiskimenn hava rópt lógina, "piratlógina". Teir stúra fyri, at íslendsk skip fara at flagga út og verða mannaði við lágløntum fiskimonnum úr Eystur-Evropu og aðrastaðni úr heiminum.

Formaðurin í íslendska sjómannafelagnum, Sævar Gunnarsson, sum fakfelagsfólk í Føroyum kenna, heldur ikki nógv um nýggju lógina.

- Reiðaríini siga, at skipini fara at fiska við "dupultum flaggi" á leiðum og eftir fiskasløgum, sum ikki stríða ímóti íslendskum áhugamálum.

Sævar vísir til reglurnar, sum siga, at øll søgulig rættindi í fiskiskapi fella til ta flaggtjóð, sum skipið til eina og hvørja tíð er skrásett undir.

- Eitt íslendskt skip, sum fiskar undir "dupultum flaggi", eitt nú við Baltisku londini, heystar søgulig rættindi til baltisku londini.

Sævar Gunnarsson heldur, at hetta fer at stríða ímóti íslendskum áhugamálum - í øllum førum, tá ið talan er um fiskiskap í Norðuratlantshavinum.

# Góð hýsuveiða elvir til prísfall

**Norðenn siga, at góða hýsuveiðan hjá føroyingum og íslendingum er orsøkin til, at feskfiskamarknaðurin fyri hýsu er so vánaligur. Lítið man tó vera at ivast í, at góða hýsuveiðan hjá norðmonnum eisini man hava havt sína ávirkan á prísgongdina**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*



*Tað hevur víst seg, at fiskur, sum missir nógv í prísi, hevur torført við at lyfta seg uppaftur á marknaðinum. Bæði í Føroyum, Íslandi og Noregi kemur nógv hýsa uppá land, og marknaðurin er um at fella saman*

Eisini í Noregi hevur økta hýsuveiðan havt við sær, at prísirnir standa til at fella hesa vikuna.

Í síðstu viku skrivaði Fiskeribladet, at eitt nýtt og lægri støði skal leggjast fyri hýsuprísin.

Í Noregi er tað framvegis soleiðis, at fiskaprísurin millum skip og virkir verður avtalaður fyri fleiri mánaðir í senn. Nú er so ætlanin at áseta nýggjar prísir mitt í einum avtaluskeiði, tí hýsumarknaðurin er so vánaligur.

### Renna undan hýsuni

Sagt verður, at norðmenn hava havt stórar trupulleikar við at selja hýsu á vanligu marknaðunum seinastu tíðina. Samstundis, sum fiskiskapurin eftir hýsu er góður, royna virkini at sleppa undan at keypa.

Norðmenn siga, at orsøkin til vánaliga hýsumarknaðin er, at føroyingar og íslendingar hava økt mundandi um hýsufiskiskapin; tí er feskfiskamarnaðurin fyri hýsu at kalla fallin saman. Sostatt fara prísirnir í Noregi eisini at fella.

Í Føroyum verður hildið, at norðmenn eisini eiga sín lut í, at marknaðurin fyri hýsu er so trekur, tí eyðvitað hava øktu nøgdirnar hjá norðmonnum eisini havt sína ávirkan - og hava verið við til at trýst prísin niðureftir.

### Long leið uppaftur…

Prísgongdin førir til, at hýsan endar í sama "posa" sum upsi, pollok, heykur og líknandi fiskasløg gera.

Tað hevur víst seg, at fiskur, sum endar í hesum "posanum", ið norðmenn taka til, hevur trupult við at lyfta seg uppaftur til eina vøru við hægri prísi.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Siggert Johansen 70 ár

Fríggjadagin 14. mars fylti Siggert Johansen á Argjum 70 ár. Siggert er føddur og uppvaksin á Argjum. Sum ungur sigldi hann í eini 3 ár, til hann fekk fast starv hjá Valdemar Lutzen, har hann koyrdi kolabil. Seinni arbeiddi hann á Bacalao sum trukkførari. Hann koyrdi tangabil hjá Shell frá 1968 til 1974, tá hann fekk starv á Landssjúkrahúsinum sum arbeiðsmaður á maskinverkstaðnum. Har var hann í 25 ár, til hann fór frá fyri aldur sum 67 ára gamal. Siggert giftist í 1954 við Kirstin, ið var ættað úr Rituvík og uppvaksin á Argjum. Kirstin andaðist í 1983, 47 ára gomul. Tey fingu børnini Jógvan og Magdu.

**mg**



## Marianna og Poli Johansen gift í 60 ár

Fríggjadagin 21. februar høvdu hjúnini Marianna og Poli Johansen í Miðvági diamantbrúdleyp. Napoleon, vanliga nevndur Poli, er føddur og uppvaksin í Miðvági. Hann sigldi heilt frá ungum av sum fiskimaður við føroyskum skipum. Eitt tíðarsekið sigldi hann í Norra. Hann gavst at sigla fyrst í 70-unum, tá hann fekk arbeiði á flakavirkinum Snarfrost í Miðvági.



Poli giftist í 1943 við Mariannu, f. Olsen, av Válinum í Vestmanna. Tey búsettust í Miðvági og eiga tey dóttrina Dinnu, sum býr í Sørvági. Poli er føddur 12. mars í 1920 og Marianna er fødd 7. desember 1914.

**mg**



## Kári Svensson í Galerie Focus

FRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Komandi fríggjadag kl 16 letur upp málningaframsýning málningaframsýning í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Tað er Kári Svensson, ið sýnir fram. Opið er frá 21. mars til 4. apríl, og opið er týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18, leygardag kl. 16 til 18.

Skráin hjá Galerie Focus fyri 2003 sær soleiðis út:

21. mars - 4. apríl:
Kári Svensson
30. mai - 13. juni:
Anker Mortensen
1. - 18. juli:
Ymisk listafólk
1. - 15. august:
Marius Olsen og
10. - 24. oktober:
Andrias Andreasen
7. - 21. november:
Olivur við Neyst
2. - 19. desember:
Ymisk listafólk

## Regina Sóloy 90 ár



Í dag, mikudagin 19. mars, verður Regina Sóloy í Svínoy 90 ár. Regina hevur alla sína tíð búð á Fløtti í Svínoy. Foreldrini vóru Anna og Fríðrik Frederiksen. Hon var av Norðtoftum, og hann var av Fløtti í Svínoy og varð nevndur Fríðrikur á Fløtti. Tey høvdu verið gift í sjey ár, áðrenn tey fingu dóttrina.

Regina ella Gina, sum hon verður nevnd, minnist einki til pápa sín. Hann var millum teir seks svínoyingarnar, sum 13. desember í 1913 ella níggju mánaðir eftir, at Gina var fødd, fórust við seksmannafarinum Havgásini. Edvard í Svínoy sigur í endurminningum sínum, Minniligar hendingar, at Havgásin hevði verið á útróðri norðan fyri Høvdan, og at teir fórust í fjarðar broddinum í einum stak ringum æli í íðuni á Lundaskor. Fýra ungar kvinnur sótu eftir syndarliga skaðadagin einkjur í Svínoy, og níggju smábørn gjørdust henda dagin faðirleys. Fyri bygdina var hetta serliga dyggur smeitur, tí undan jólum í 1912 fórust fimm ungir menn í Svínoy á útróðri.

Gina giftist í 1934 við Hendriki Sóloy. Hann var ættaður Frammi úr Smið í Árnafirði. Hendrik doyði í 1981. Hann var útróðrarmaður og skipsmaður. Tey bæði giftust inn á Fløtti, og tey fingu fýra børn: Fróði, Ásmundur, Anna og Høgni. Fróði og Anna búgva í Klaksvík, og Høgni býr á Eiði. Ásmundur búði í Esbjerg og seinni í Keypmannahavn. Tað var ein dyggur smeitur fyri Ginu, tá ið hann doyði av herviligari sjúku fyri níggju árum síðani. Ásmundur er grivin í Svínoy.

Hóast sín høga aldur, so er Gina væl fyri. Hon livir og andar fyri familjuni og sínum næstu, hon fylgir væl við í tí, sum gongur fyri seg í samfelagnum, og hon er ein meistari í práti at siga frá tí, sum hon hevur upplivað og hoyrt um í sínum langa lívi. Svínoyingar og tey, sum vitja í Svínoy vita, at í heiminum á Fløtti valdar Gudsóttin, og at gestablídnið er sera stórt.

Onga staðni dámar føðingardagsbarninum so væl at vera sum í Svínoy. Har úti og millum bygdarfólkið ynskir hon at vera, og hagar stendur hugur hennara, tá ið hon er burturi av oynni. Men tá ið aldurin er so høgur, og eingin av teimum næstu er í heimbygdini, er tað gott at hava møguleikan at vitja hjá børnunum. Í vetur hevur Gina verið eitt langt skifti hjá dóttrini, og hon er í Klaksvík, nú hon fer um tey níti.



*Justinus Poulsen úr Hvannasundi er formaður í stýrinum hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.*

## Justinus Poulsen nýggjur formaður

15. februar var fundur í stýrinum hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum. Á fundinum skipaði stýrið seg av nýggjum og sær nú soleiðis út: Justinus Poulsen úr Hvannasunndi er formaður, Árant Johannesen er næstformaður, skrivari er Jákup Olsen, kassameistari er Kristian Thorleifsson og Sigurd Sørensen er stýrislimur.

## Dagurin

19. mars. Jósef. Dagurin hildin til minnis um festarmannin hjá Mariu Moy. Hann gjørdist, sum vera man, halgimenni hjá húsasmiðum og handverkarum. Bíbilska navnið merkir *Guð lati meg fjølgast.*